# Eysturevropearar mugu aftur til Íslands

**Serliga arbeiðsskipanin fyri ES-borgarar er ikki longur galdandi í Føroyum, og tí hevur politiið víst fýra evropearum, sum starvaðust hjá íslendsku fyritøkuni TG í Føroyum, av landinum**

ÚTLENDINGAR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Meðan nógv arbeiði enn var í landinum, kom reglan um, at es-borgarar kundu fáa arbeiði í Føroyum við stuttum skotbrái. Hetta var 1. juli 2008.

Men nú arbeiðsloysið er vaksið, er reglan tikin av. Lógin varð 1. februar fyribils sett úr gildi.

Tað hava allir arbeiðsgevarar tó ikki givi sær far um.

Politiið, sum er eftirlitsmyndugleiki við útlendskari arbeiðsmegi, fekk eina fráboðan um, at íslendska fyritøkan TG-verk, sum hevur arbeiði bæði í Havn og í Vági, hevði fýra eysturevropearar í arbeiði. Og politiið kom eftir, at menninir hvørki høvdu uppihaldsella arbeiðsloyvi eftir galdandi reglum.

Arbeiðsgevarin átók sær alla ábyrgdina av, at menninir vóru komnir til Føroya at arbeiða, og politiið og arbeiðsgevarin samdust um, at menninir skuldu fara aftur til Íslands, haðani teir vóru komnir. Skulu teir koma aftur til Føroya at arbeiða, mugu teir søkja um uppihalds- og arbeiðsloyvi, sum aðrir útlendingar noyðast, norðurlendingar undantiknir.

Fyritøkan TG-verk hevur yvir 20 menn í arbeiði. Hinir eru allir norðurlendingar.



*Útlendingarnir, sum arbeiddu ólógliga, vóru í starvi hjá TG-verki. Fyritøkan byggir m.a. røktarheimið í Vági*



# VER VIÐ AT VELJA

**Í ár skulu 12 limir veljast til Umboðsráðið fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna. Endamál felagsins er m.a. at eiga partapeningin í Tryggingarfelagnum Føroyum P/F og Betri pensjón P/F. Sum tryggingartakari kanst tú nú vera við til at velja hesi 12 umboð.**

**VALEVNINI ERU HESI:**
Andrass Skaalum, Velbastaðvegur 42, 100 Tórshavn
Andrias Ziska, Varðabrekka 3, 100 Tórshavn
Bergur Poulsen, Nýggivegur 6, 620 Runavík
Birgir Mohr, Sandabrekka 8, 210 Sandur
Durita Djurholm, Kristiansgøta 26, 188 Hoyvík
Egon Hansen, Fútalág 14, 100 Tórshavn
Heidi Kollsker, Andrasargøta 8, 188 Hoyvík
Hjørdis Viberg, Toftavegur 31, 650 Toftir
Jákup Suni Lauritsen, Traðarvegur 21, 380 Sørvágur
Jan Müller, Sleipnisgøta 10, 100 Tórshavn
Jona U. Nielsen, Undir Fossum 44, 700 Klaksvík
Jónsvein Knudsen, Á Heygnum 7, 620 Runavík
Mamy Dahl Sørensen, Djúpagilsvegur 36, 188 Hoyvík
Páll Petersen, Á Gørðum 5, 180 Kaldbak
Per Persson, Áargeil 21, 100 Tórshavn
Regin Hammer, Dýrindalsgøta 1, 188 Hoyvík
Rógvi Thomsen, Gøtuteigur 10, 850 Hvalba
Schandoff Vang, Undir Grótheyggi 12, 400 Oyrarbakki
Tóra við Keldu, Mylnugøta 38, 700 Klaksvík

**ATKVØÐURÆTTUR**
Atkvøðurætt hava øll, sum hava verið tryggingartakarar í Tryggingarfelagnum Føroyum P/F síðan 1. januar 2010.

Tryggingartakarar, har árliga tryggingargjaldið er minni enn 50.000 kr., hava 1 atkvøðu. Fyri hvørjar byrjaðar 50.000 kr. í árligum tryggingargjaldi, fær limurin 1 atkvøðu afturat, tó í mesta lagi 10 atkvøður. Tað ber ikki til at atkvøða við fulltrú.

**ATKVØÐUSEÐIL OG TÍÐARFREIST**
Atkvøðuseðlar kunnu umbiðjast **frá 8. februar 2010 til og við 21. februar 2010.**

Atkvøðuseðil kann umbiðjast soleiðis:

- tel **345 600**
- fax **345 604**
- teldupost til **umbodsradsval@trygging.fo**

Tá atkvøðuseðil verður umbiðin, er neyðugt at upplýsa navn/navn á virki, bústað og føðingardag.

Atkvøðuseðilin skal verða latin innaftur í seinasta lagi **26. februar 2010.**

**VALÚRSLIT**
Tá valúrslitið fyriliggur, verður tað almannakunngjørt í miðlunum.

OGNARFELAG
TRYGGINGARTAKARANNA